# Gávur kunnu sendast tollfrítt

**Nú ber til at senda gávusendingar úr útlandinum til Føroya, uttan at hesar skulu tollast. Markvirðið á gávunum er 700 kr**

GÁVUSENDIGNAR
*tíðindaskriv*

Sambært rundskrivi frá Toll- og Skattstovu Føroya um gávusendingar, eru gávupakkar, hvørs tollur lítið og einki hevur at týða, undantiknir tolli og avgjaldi. Heimildin til hetta undantak er í § 6, litra h í tolllógini, jbr. § 27 stk. 3 í mvg-lógini.

Víðari stendur í rundskrivinum: Tollur og avgjald skal ikki gjaldast fyri vørur, sum verða sendar frá einum privatpersóni uttan fyri Føroyar til ein privatpersón í Føroyum, tá ið talan er um gávupakkar, og innflutningurin er uttan vinnuligt endamál.

Innflutningur uttan vinnuligt endamál er at skilja sum sendingar, ið:

- bert eru av og á, t.d. føðingardagsgáva, jólagáva o.t.
- bert fevna um vørur, ið eru ætlaðar til móttakaran sjálvan ella familju hansara at nýta, og hvørs eginleikar ella nøgd ikki kunnu geva høvi at ivast í, at innflutningurin fer fram við endamáli, ið ikki er vinnuligt
- verða sendar móttakaranum uttan at hann á nakran hátt skal gjalda fyri sendingina

Frítøkan er galdandi fyri vørur, sum í mesta lagi hava eitt virði á kr. 700, fyri hvørja gávu. Um virði á eini vøru fer upp um hesa upphædd, skal tollur og avgjald gjaldast fyri fulla virði á vøruni. Frítøkan er ikki galdandi fyri vørur sum innihalda alkohol og tubbaksvørur.

Tað er tó framvegis sera umráðand fyri skjóta tollavgreiðslu, at sendarin á eina tollsøgn, sum skal fylgja við postsendingini, skrivar, hvat er í sendingini. Har skal í minsta lagi standa nakað um nøgd, slag og virðið á innihaldinum. Á hendan hátt verður tollviðgerðin løtt og skjót.

# Heystframsýning á Glyvrum



*Forna verður í Mentanarvikuni karmur um heystframsýning á Glyvrum*

**Sum partur av Mentanarvikuni í Runavík, verður í døgunum 23.-30. oktober skipað fyri heystframsýning í bygdasavninum Forna á Glyvrum**

HEYSTFRAMSÝNING
*tíðindaskriv*

Framsýningin snýr seg um seyð og um týdningin av seyði í Føroyum gjøgnum tíðina.

Høvi verður at síggja myndaframsýning og ymiskar lutir í sambandi við evnið. Harafturat verður møguleiki at fáa ein drekkamunn við breyði og ymiskum viðskera av seyði.

Umframt at opið verður fyri almenninginum hvønn dag í Mentanarvikuni, fáa skúlaflokkar høvi at bíleggja sær tíð at vitja framsýningina í Forna eftir Mentanarvikuna.

# Tann nýggi James Bond er ljóshærdur

Á tíðindafundi í London fríggjadagin kunngjørdu fólkini aftan fyri James Bond filmarnar, at tað verður Daniel Craig, ið avloysir Pierce Brosnan í leiklutinum sum heimsins best kendi loyniligi agentur. Hetta verður sostatt fyrstu ferð, at James Bond verður ljóshærdur.

Daniel Craig er ikki so kendur enn, men hevur tó spælt í Thomb Raider, Sylvia og The Road to Pertition. Daniel Craig fer beint eftir nýggjár undir innspælingarnar til nýggja James Bond filmin Casino Royal. Hetta er 21. filmur í røðini um James Bond og Craig er tann sætti sjónleikarin, ið spælir leiklutin.

Tann upprunaligi James Bond, Sean Connery spældi seks filmar, bert avbrotin av einum filmi har Georg Lazenby røkti leiklutin, Roger Moore spældi sjey filmar, og varð síðan avloystur av Timothy Dalton, ið ikki rættuliga vann fólkaligan tokka í leiklutinum, hann spældi bert tveir filmar. Pierce Brosnan gav leiklutinum tað heilt rætta og varð væl umtóktur í leiklutinum, hann spældi fýra filmar.

Daniel Craig er tann fyrsti ljóshærdi James Bond, og enn er ikki greitt um hann eisini verður tað í filminum, men um hann verður tað, er eingin ivi um, at hetta er ein stórur sigur fyri teir ljóshærdu loyniligu agentarnar, ið fáa eitt heilt annað trúvirðið.




*Daniel Craig kom á tíðindafundin við Tower Bridge í London í báti hjá bretsku sjóverjuni*

# Paradox longu á listanum

Fløgan hjá Paradox kom út fríggjadagin, men er hóast hetta komin inn á sølulistan hjá 3'aranum fyri seinastu viku. Fløgan liggur á 10. plássi og er ein av 4 føroyskum fløgum á sølulistanum. Aftur hesa vikuna er tað Lívsins Land hjá Ólavi á Váli, ið liggur ovast á listanum.

Alt hjá Kim Hansen er endurinnkomin á listan, og liggur hesa vikuna á 5. plássi. Tann fjórða føroyska fløgan er savnsfløgan hjá Kularrótum, ið liggur á 7. plássi. Nakrar fløgur eru nýggjar á listanum hesa vikuna, kanska ikki heilt óvæntað, er nýggja fløgan hjá Kashmir sloppin upp í part á 4. plássi, tað er kanska meira forkunnugt, at tann øri froskurrin "Crazy Frog" er sloppin inn á listan. Crazy Frog er eitt heimshit í løtuni, og nú hoppar froskurin altso eisini í føroyskum fløguspælarum.

# P-vørðarnir aftur til arbeiðis

**Teir báðir P-vørðarnir vóru ikki raktir leingi av verkbanninum. Fyrrapartin týsdagin fingu teir boð um at fara aftur til arbeiðis, tí teir eru ikki knýttir at fíggjarmálaráðnum.**

VERKBANN
*Snorri Brend*




*P-vørðarnir í Havn eru ikki undir fíggjarmálaráðnum. Myndugleiki teirra er fútin*
*(savnsmynd)*

**Havn:** - Hetta var ógvuliga óheppið!, sigur annar av parkeringsvørðunum í Havnini, Thordur Thorsteinsson.

Tá samráðingarnar slitnaðu millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið, rakti tað eisini P-vørðarnar í Havn. Tey góvust tí at arbeiða, tá almenna fráboðanin um hetta varð kunngjørd hósdagin í farnu viku.

Seinni funnu so løgfrøðingar fram til, at vørðarnir báðir í roynd og veru ikki eru knýttir at fíggjarmálaráðnum.

- Myndugleiki okkara er Fútin og Jón Klein Olsen. Hagani fingu vit so boð um at fara aftur til arbeiðis fyrrapartin týsdagin.

- Og kl. hálvgum tólv týsdagin vóru vit so aftur til arbeiðis, sigur Thordur Thorsteinsson.

### Bøtur

Tað var í týsdagsblaðnum at vit skrivaðu um, at nú var ikki neyðugt hjá bilførarum at ansa so væl eftir P-skivunum á bilum sínum.

Báðir P-vørðarnir vóru í verkfalli, og tað var bara í heilt serstøkum førum at løgreglan vildi skriva fráгreiðingar um bilar, sum stóðu avbera illa parkeraðir. Tað vísir seg kortini, at fólk hava stóra virðing fyri arbeiðinum hjá báðum P-vørðunum í Havnini. Líkt var til, at fólk ikki settu bilarnar øðrvísi enn áður ella longri enn loyvt er.

Men onkur fekk helst ein minni hvøkk, tá tey týsdagin sóu annan av P-vørðunum skriva onkra bótina til ein bilførara, sum ikki hevði sett P-skivuna rætt ella ikki stóð rætt parkeraður.

Fyrrapartin í gjár, tá vit tosaðu við Thord Thorsteinsson var hann staddur nærhendis Vørðsluni, har Sjónvarp Føroya heldur til.

- Her standa so tveir bilar, sum fáa ein seðil undir viskaran frá okkum, sigur Thordur.